# Grunnur við 50-100 milliónum



**– Ein virkin økis-menningarpolitikkur er ein fyrimunur fyri alt samfelagið, sigur vinnuráðið í Vági**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skal syðra helvt í Suðuroy mennast aftur, er tað neyðugt at ein suðuroyargrunnur verður settur á stovn.

Tað sigur Vinnuráðið í Vági, sum umfatar syru helvt í Suðuroy í eini nýggjari frágreiðing um støðuna í vinnuni í syðru helvt í Suðuroy.

Men tað skal eisini nógv annað til.

Vinnuráðið sigur, at ein Suðuroyargrunnur má hava eitt stovnsfæ upp á 50 -100 milliónur krónur

Hetta skal vera ein grunnur, sum kann stuðla vinnuni í økinum við at seta vágafúsan pening í vinniligt virksemi.

Men av tí at talan er um eitt vinnuráð fyri suðuroyar syðru helvt, verður farið eitt stig longur. Sostatt verður enntá mælt til at gera eitt almennan ella hálvalmennan menningargrunn fyri Suðuroyar syðru helvt.

– Men skuldi tað almenna sett á stovn ein grunn fyri Suðuroyar syðru helvt, er tað av avgerandi týdningi, at hann verður umsitin lokalt, tí tað er umráðandi at tey, sum stjórna grunninum, altíð vita, hvussu støðan er í økinum sigur vinnuráðið.

Ein grunnur fyri Suðuroyar syðru helvt, kundi sett vágafúsan kapital í nýggj og eldri burðardygg virki, ið hava fyri neyðini at økja um vágafúsa kapitalin. Eisini kundi tað almenna latið ein slíkan grunn goldið og umsitið flutningsstuðulin til vinnuna í Suðuroyar syðru helvt og í Suðuroy sum heild, so at vinnan varð javnt sett við vinnulívið aðrastaðni í landinum.

### Karmar eru ikki nóg mikið

Vinnuráðið fegnast um at nýggjur Smyril verður bygdur, at djúphavn er gjørd í Vági, samferðsluhavn er gjørd á Drelnesi og at berghol skal gerast ímillum Hov og Øravík.

Tað bøtir um karmarnar fyri vinnulívinum í økinum, og tað fer eisini at geva fleiri arbeiðspláss í styttri tíð.

– Men hesi tiltøk hjálpa tó ikki nóg mikið sum frá líður, tí at betra um karmarnar fyri vinnuna, meðan vinnan sjálv doyr, er eingin loysn. Og høvuðstrupulleikarnir hjá vinnuni í løtuni eru heilt aðrir.

– Størstu trupulleikarnir hjá vinnuni í Suðuroyar syðru helvt, er væntandi vágafúsur kapitalur, væntandi almennar íløgur í privat virkir í økinum, flutningskostnaðurin innanoyggja og flutningstrupulleikar innanoyggja og til umheimin.

Vinnuráðið sigur, at Myndugleikarnir mugu tí bera so í bandi, at flutningskostnaðurin lækkar fyri vinnuna í Suðuroynni, soleiðis at hon gerst javnt stillað við aðrar partar av landinum á hesum øki.

– Tað er eisini neyðugt at fáa betri beinleiðis samband ímillum Suðuroyar syðru helvt og útlond, so fiskavirkini í økinum fáa fleiri framleiðsludagar um vikuna.

Somuleiðis verður tað avgjørt neyðugt at fáa fleiri almenn arbeiðspláss til økið. Hetta hevði ikki einans verið við til at stabilisera búskapin í økinum, men hevði óivað viðført, at fleiri vælútbúgvin fólk vendu heimaftur til Suðuroyar syðru helvt at búð.

– Fiski- og alivinnan standa fyri uml. 55% av øllum lønarútgjaldingum í Suðuroyar syðru helvt og tí merkist tað sjálvsagt, tá ið privata vinnan er fyri bakkasti.

Vinnuráðið heldur, at ein stovnur, ið heilt avgjørt kundi verið fluttur til Suðuroyar, er Strandferðslan

– So leingi umsitingin er so langt frá brúkaranum, verður tænastan aldri fullgóð

Aðrir stovnar, ið kundu verið fluttir úr miðstaðarøkinum, eru Fiskiveiðueftirlitið, Realurin, Stuðulsstovnurin, Húsalánsgrunnurin, Skráseting Føroya fyri Suðuroynna, Fiskiveiðueftirlitið, Tinglýsingin fyri Suðuroynna, ALS fyri Suðuroynna og Toll- og Skattstova Føroya.

Somuleiðis kundu aðrir almennir stovnar, ið lítið og einki beinleiðis samskifti hava við borgaran, umframt